# Hvalir og krimiir undir jólatrænum

Hvalurin er mín eftir Helga Jacobsen og Adventus Domini eftir Jógvan Isaksen seldu best til jóla í Rit og Rák og í Gamla bókhandli. Hugvekjandi er, at metsølulistarnir hjá teimum báðum bókahandlunum, annar í SMS og hin í Miðbýnum, eru rættiliga ymiskir. So kunnu fólk hugleiða um, hví so er. Eins og undanfarin ár, komu nógv fleiri yrkisbókmentir út til. Metsølulistarnir yvir føroyskar bøkur, seldar í desember til jóla, síggja soleiðis út:

**H.N. Jacobsens Bókhandil**



Adventus Domini eftir Jógvan Isaksen
Hvalurin er mín eftir Helga Jacobsen
Marita eftir Dagny Joensen
Fiskar undir Føroyum eftir Rógva Mouritsen
Tórshavnar Býaratlas
Fisher Heinsen eftir Óla Olsen
Krossvegir ritsj. Heini í Skorðini og Páll Holm Johannesen
Skakandi tilburðir
Seyðalitir eftir Gudmund Niclasen
Fossanes Fossanes eftir Páll Kunoy

**Rit og Rák**



Hvalurin er mín eftir Helga Jacobsen
Fossanes eftir Páll Kunoy
Skakandi tilburðir
Adventus Domini eftir Jógvan Isaksen
Fisher Heinsen eftir Óla Olsen
Marita eftir Dagny Joensen
Fiskar undir Føroyum eftir Rógva Mouritsen
Havnin eftir Birgar Johannesen
Krossvegir ritsj. Heini í Skorðini og Páll Holm Johannesen
Álmanakkin

# Kollfirðingar eiga ársins »nýføring«



*Bæði mamma og dóttur vóru væl fyri í morgun*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

**Ein lítil didda, sum varð fødd mikunáttina 2. januar, er orsøk til, at Kollfirðingar í ár eiga fyrsta barnið í 2008**

FÓLKALÍV
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Endiliga kom ein didda í reiðrið hjá teimum báðum Siv og Eyðfinn Joensen úr Kollafirði, sum frammanundan eiga tríggjar dreingir: Benjamin 9 ár, Jóhannus 7 ár og Aron 3 ár.

- Hon hevur ordiliga lumpað okkum, tí vit vóru øll sannførd um, at tað fór at vera enn ein drongur, sigur eydnuríka mamman, Siv Joensen, sum næstan ikki trúði tí, tá hon fekk gentuna upp til sín. Og hon fortelur, at brøðurnir longu høvdu spælt sær við tankan, um teir fingu eina lítlasystur.

- Teir høvdu avtalað, at teir skuldu skiftast um at flætta henni hárið, ein dag í senn. Men vit søgdu við teir, at tað fór helst at vera ein drongur, tí maðurin helt seg hava sæð okkurt á scannaranum, sum ikki hoyrdi til eina diddu, sigur Siv smílandi.

Siv, sum upprunaliga er úr Norra, hevur búð í Kollafirði í seks ár, har hon starvast sum leiðari fyri dagstovnin við Botnánna.

Hon var sett at eiga 29. desember, men átti hetta fyrsta barnið í landinum í ár tann 2. januar kl. 01:50. Dóttirin var 55 cm til longdar og vigaði 4250 g. Bæði mamman og dóttirin vóru væl fyri úti á Landssjúkrahúsinum í morgun.

# Konufólkamangul kann gerast vanlagna føroyinga

**Jákup á Dul Jacobsen heldur tað vera væl skiljandi, at fyritøkur sum Kaupthing Bank taka seg úr Føroyum, tí tað ávirkar íløguhugin, at fólkatalið stendur í stað**

SAMFELAG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Jákup á Dul Jacobsen, føroyskur vinnulívsmaður í Íslandi og faðir at Stórutjørn, sigur við Rás2, at fortreytin fyri allari menning í Føroyum er ein støðugur vøkstur í fólkatalinum*

Jákup á Dul Jacobsen, føroyskur vinnulívsmaður í Íslandi og faðir at Stórutjørn verkætlanini, heldur tað vera ein ovurhondsstóran trupulleika, at fólkatalið í Føroyum stendur í stað og at 2000 kvinnur eru í undirskoti.

- Um Føroyar ikki blóma, so blóma vit heldur ikki. Tí er tað avgerandi fyri okkum, at landið er í vøkstri, sigur Jákup á Dul Jacobsen um Stórutjørn. Hann greiðir frá, at vantandi fólkavøksturin ger marknaðin minni spennandi, og tí taka fyritøkur sum Kaupthing Bank seg úr landinum. Og hóast Jákup á Dul Jacobsen heldur tað vera keðiligt fyri Føroyar, so er tað er væl skiljandi.

– Í longdini er tað helst ov nógv arbeiði av at hava ein banka í einum so lítlum landi. Og um teir síggja, at teir fáa meira burturúr við at gera íløgur onkra aðrastaðni, so gera teir tað, sigur hann við Rás2.

## Eftirlýsir vøkstur

Jákup á Dul Jacobsen hugleiðir um, at í 90'unum vóru úti við 50.000 fólk í Føroyum, meðan tað vóru eini 250.000 í Íslandi. Síðani hevur fólkatalið verið óbroytt í Føroyum, meðan talið er hækkað til 312.000 í Íslandi, ella 6.000 fólk árliga síðstu árini.

- Vuksu Føroyar við til dømis 1000 fólkum árliga, so vóru fortreytirnar nógv øðrvísi, eitt nú við meira virksemi, ný- og útbyggingum og meiri flúgving upp á landið, sigur Jákup á Dul Jacobsen. Hann vísir á, at tá høvdu eini 70.000 fólk búð í Føroyum um 10-15 ár, og grundarlag kundi verið fyri tveimum flogfeløgum og nógv betri tænastum sum heild.

Kortini roknar Jákup á Dul Jacobsen við at seta spakan í til Stórutjørn í august í ár.

## Kvinnurnar skulu føða børnini

Kveik.fo hevur roknað uppá nýggjastu fólkahagtølini, sum tala sína greiðu søgu: Undirskotið av ungum kvinnum er munandi størri enn miðalhagtøl geva fatan av. Serliga mangla kvinnur í aldrinum frá 20 til 35 ár. Hesir aldursbólkar fevna eitt nú um árini, tá ið fólk nema sær útbúgving, seta búgv, fáa børn og leggja sær sína yrkisleið.

- Um tað "normala" er, at eins nógvar kvinnur og menn búgva í einum landi, so mangla fleiri enn 900 kvinnur í aldrinum 20 til 34 ár. Í aldursbólkinum 20 til 64 ár resta 2000 kvinnur í, stendur á heimasíðuni hjá Kveik.fo.

Eisini verður sagt, at tað eru færri kvinnur enn menn í øllum aldursbólkum, inntil vit koma uppum 70 ár. Tá vendir myndin, og kvinnurnar gerast fleiri í tali, tí teirra miðallivialdur er munandi hægri enn hjá monnunum.